

*“Hann skuldi ikki itið áarløkur (sum orðið Bach merkir) men hav (Meer á týskum), skrivaði Ludwig van Beethoven um J.S. Bach*

# Jóhannespassió eftir Johan Sebastia



*Frægir føroyskir solistar: Elsa Susanna Dalsgaard ...*



*Berghild Poulsen ...*



*og Ernst Sondum Dalsgarð*

## Í kvøld og í morgin verður Jóhannes-passjiónin framførd í Christians-kirkjuni og í Norðurlanda-húsinum

Um tónaskaldið J. S. Bach (1685-1750) segði Ludwig van Beethoven:" Nicht Bach sondern Meer hätte er heissen sollen", t.e. "Ikki áarløkur ( sum orðið "Bach" merkir) men hav ("Meer" á týskum) skuldi hann itið". Soleiðis hava øll tónlistarlig stórmenni frá Haydn, Mozart og Beethoven um Mendelsohn, Schumann og Brahms og heilt upp til nútíðar tónaskøld ligið á knøum fyri tí tónleikaríkidømi, sum Bach legði eftir seg.

Allar tónlistargreinir, sum hann gav seg í holt við, megnaði hann til fullnar; men inniliga trúgvandi, sum hann var, var tað meira enn nakað tað kirkju-musikalska, sum bleiv hansara aðal lívsverk. "Soli Deo gloria" (Gudi eina heiðurin) vóru merkisorð hansara yvir øllum, hann festi á blað, tað veri seg vokalur ella orðleysur tónleikur. Og so sterkur er hansara andligi boðskapur, at hann millum kirkju- og tónlistarfólk ber heitið "tann fimti evangelisturin".

Sum tindar millum øll tey mongu gitnu bókmentaligu, myndlistarligu og tónlistarligu verk, sum frá miðøld og fram til okkara dagar hava lýst líðing og deyða Jesu Krists, standa Matteuspassiónin og Jóhannes-passiónin. Talan er um oratori-um, dramatisk tónaverk, har bíbilskar hendingar verða lýstar við orðum og tónum, men ikki við leiklistarligum spæli sum í operum. Frávikið frá oratorium annars er, at passiónirnar burtur-av snúgva seg um pínslusøgu og deyða frelsarans á krossinum.

### Føroysk framførsla

Tað er *Havnarkórið*, sum hevur tikið stig til hetta tónleikatiltak. Seinastu 20 árini hevur kórið lagt dent á - stundum í samvinnu við onnur kór - regluliga at kunna fáa í lag framførslur av nøkrum av tónleikasøgunnar størri kórverkum. Nevnast kunnu Magnificat og Jólaoratoriið eftir J.S.Bach, Händels Messias, Skapanin eftir Joseph Haydn, Krýningarmessan hjá W.A. Mozart, "Ein deutsches Requiem" hjá Johs. Brahms, Verdis Requiem, oratoriið "Elias" eftir Mendelssohn, Carmina Burana hjá Carl Orff og okkurt meira.

Til framførsluna nú av Jóhannespassiónini telur kórið 45 sangarar.

*Orkestrið* er mannað við 20 musikarum, teir flestu lærarar í føroysku musikkskúlaskipanini, men 6 koma uttanlendis. Kon-sertmeistari er **Sámal Petersen.**

*Solistarnir* eru 6 í tali. **Berg-hild Poulsen**, sopran, er væl kend í føroyska tónlistarheim-inum. Umframt at hon í so mong ár hevur verið ein berandi kraft í føroyskum kórsangi, hevur hon



*Havnakórið hevur seinastu 20 árini lagt seg eftir at framføra nøkur av stóru kórverkunum í tónleikasøguni. Nú stendur so Johannespassiónin á skránni*